# Almannamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. november 2017 |
| Mál nr.: | 16/00052 |
| Málsviðgjørt: | PL |

**Fylgiskjal 1**

## Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl., sum broytt við løgtingslóg nr. 135 frá 19. desember 2014, løgtingslóg nr. 10 frá 9. februar 2001, løgtingslóg nr. 58 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 28 frá 13. mars 2000, løgtingslóg nr. 65 frá 15. mai 2012, løgtingslóg nr. 115 frá 24. november 2016, løgtingslóg nr. 104 frá 11. november 2010 og løgtingslóg nr. 48 frá 6. mai 2016 verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 1.** Á hvørjum ári verða viðbøtir veittar til ávísar pensiónistar, sum hava bústað í Føroyum. Hjún, har bæði eru pensjónistar, fáa eina viðbót í felag, og verður viðbótin útgoldin við einari helvt til hvønn.<br>*Stk. 2.* ... | **1.** Í § 1 verður aftaná stk. 1 sum nýtt stk. sett:<br>“*Stk. 2.* Fólkapensjónistur, ið er føddur aftaná 31. desember 1952, hevur ikki rætt til viðbót sambært stk. 1.”<br>Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3. |
| | **§ 2** |

| | |
|---|---|
| | Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. desember 2019 og er galdandi fyri útgjald av veitingum frá og við januar 2020. |